## DAGSINS MEINING

# Børn og fiskur

Fiskirannsóknarstovan er farin undir eitt átak til tess at kunna føroyska skúlaungdómin um virksemið hjá stovninum og um tey mongu ymisku fiskasløgini í føroyskum sjóøki.

Hetta er eitt sera sera áhugavert, spennandi og viðkomandi tiltak. Vit liva av sjógvinum og tí, sum havið gevur. Men samstundis tykist tað mangan, sum um hetta evnið er nakað av tí flestøll vita minst um. Vit ivast ikki í, at skúlin roynir at læra børnini alt, sum ein eigur at kunna krevja, at tey vita, um lívið í havinum kring Føroyar. Men tað verður ikki tað sama at sita í eini skúlastovu og læra um fisk og sjógv og so at koma umborð í ein trolara og har síggja øll tey fiskasløg, sum eru at finna um okkara leiðir. Hetta er eitt sera pedagogiskt tiltak og børnini eru týðuliga hugtikin av tí tey uppliva. Tiltakið hjá Fiskirannsóknarstovuni er ikki bert ein kunning um fisk og fiskasløg, men hetta er eisini ein kunning um ta gransking, ið fer fram á hesum øki, har Magnus Heinason er eitt týðandi amboð.

Vit liva øll av fiski og fiskivinnu so ella so. Tað er tí av størsta týdningi, at uppvaksandi ættarliðið hevur samband við fiskivinnuna og dyggan kunnleika til lívfrøðiliga støðið undir okkara høvuðsvinnu. Tað hevur somuleiðis stóran týdning, at tey ungu verða væl og virðiliga kunnað um ta gransking, sum hevur so stóran týdning fyri eina burðardygga fiskivinnu. Tað ræður tí um at geva teimum ungu holla vitan og ein sunnan hugburð, so tey seinni í lívinum kenna ábyrgd fyri umhvørvi á sjógvi og landi og virðing fyri øllum tí lívi, ið her nørist. Fiskirannskóknarstovan hevur tí uppiborið stóra tøkk fyri tiltakið og tað er at vóna, at ferðandi framsýniningin framvegis fær góða undirtøku millum børn og lærarar.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Fólkaskúlin og kommununnar – ein ræðandi ætlan

**Eyðgunn Samuelsen**
*býráðslimur, Klaksvíkar Býráð*



Formaður Føroya Lærarafelags hevur eina áhugaverda grein í Sosialinum tann 28 januar 2003, um hvørja støðu felagi hevur til spurningin um hvør skal umsita fólkaskúlan, landið ella kommununnar. Undirritaða hevur ikki sum so áhuga í at fara út í kjak við Føroya Lærarafelag, men evni er so viðkomandi og alt ov lítið umrøtt, tí hesar viðmerkingar.

**Fólkaskúlin ongantíð út til kommununar**
Greinin er full av ræðandi orðum, so sum : tað má aldrin henda, at fólkaskúlin verður lagdur út til kommununar at umsita. Og hví ikki? Ein avgerandi orsøk sambært greinini, er, at so skulu kommununar enntá samráðast um læraralønir !! Hvat er trupuleikin við hesum? í 2001 samráddust kommununnar bæði við pedagogfelagi og dagrøktarnar um løn, so vítt eg veit, fingu hesir bólkar ikki verri úrslit enn øll onnur, ið bert samráddust við landið. At nevna Viðareiðis kommunu og savnsrøktina sum eitt ræðandi dømi um, at kommununnar forða skúlunum at virka er ein rættuliga avgjørd orðing. Víðari verður sagt, at ikki ber til at tryggja sama støði í undirvísingini í øllum kommunum. Hví ber tað ikki til ? ber ikki til eins og í dag, at áseta í lógina hvørji dygdarkrøv skulu verða ? verður tað ikki lættari hjá landinum at seta út í kortið og hava eitt dygdargott eftirlit, tá ið landið ikki eisini skal umsita skúlan ? Lógin um barnaansing setur minstakrøv til dygdina á barnaansingini, er tann dygdin lækkað tí økið var lagt út til kommununar ? Hví verða dagstovnar bygdir um alt landið nú, og hví søkja allir dagstovnar eftir fakfólki ???

**Tilvildarlig umsiting**
Kommunustýrini vera skýrd tilvildarlig, skifta fjóðra hvørt ár og koma at umsita tilvildarliga, verður sagt. Er tað ikki somu veljarar ið velja løgting og harvið óbeinleiðis landsstýri sum velja kommunustýrini, eru tey eisini tilvildarlig stýri ? ella hvar er munurin? Løgtingið verður eisini útskift fjórða hvørt ár, ergo umsita tey eisini tilvildarliga, eg spyrji bara. Umsitingin av skúlanum fer at verða tengd at fíggjarligu støðuni hjá kommununum verður sagt, játtanin hjá Fólkaskúlanum í dag, verður hon ikki eisini tengd at fíggjarorkuni hjá landinum? Hevur Lærarafelagið ikki tey síðstu 10 árini ført fram, at skúlin fær ov lítla játtan frá landinum?

Tá ið øki verða løgd út at umsita, tá skulu pengar sjálvandi fylgja við, tað eru øll samd um. Annars er kommunukassin í mínari verð ein partur av fíggjarorkuni hjá landinum, so ilt er at síggja nakran mun á honum og landskassanum, vanliga fylgjast hesir at hvat fíggjarstøðu viðvíkur.

Eg skilji ikki hesar pástandir, teir vísa eina turkatrúgv uppá, at alt, ið verður umsitið sentralt, virkar og alt, ið verður umsitið púti í kommununum virkar ikki. Eisini sýnir hetta eitt grundleggjandi misálit á kommunustýrini. Eg vænti, at um ein vil, kann ein gott finna dømi ið vísa fyri og ímóti báðum pástandum. Eitt annað er so tað, at best er at hava størri kommunalar eindir at umsita eitt nú fólkaskúlan, men tann spurningin trúgvi eg komununar sjálvar høvdu funni eina loysn á.

**Nær brúkaranum**
At enda verður sagt í greinini, at eitt er at vera so nær brúkaranum sum gjørligt, men hetta, at lata kommununnar umsita skúlan, er at fara brúkaranum ov nær ! Hvussu ber til, at barnaansingin kann liggja so nær brúkaranum sum hon gerð, og eftir mínum tykki virka betur nú, enn hon gjørdi tá hon lá undir landinum? Barnaansing og skúlagongd eru eftir mínum tykki tvær síður av somu søk, hví skal tað verða neyðugt at skilja barnaárini sundur og seta mørk, so fyrri parturin er kommunalur og tann seinni almennur. Hetta er ikki at seta barnið og brúkaran í miðdepilin og tað gerst alt meira neyðugt, um skúlin skal brynja barnið til eina alt fløktari verð. Tíðirnar broytast skjótt og tí ber ikki til bert at halda fast við gamla vanahugsan, vit mugu taka støði í nútíðini og teimum fortreytum, ið hon setir. Vit sakna eitt sakligt orðaskifti um, hvussu vit best nøkta tørv og framtíðarkrøv til børn og ung.

Internet á Býarbókasavninum

# Reglugerð og vegleiðing

TÍÐINDASKRIV
*Býarbókasavnið*

Bókasavnið hevur tvær internetteldur fyri vaksin. Tey, sum eru fylt 13 ár, kunnu nýta hesar ókeypis.

Tað ber til at nýta teldurnar, um tær eru tøkar. Men eisini ber til at bíleggja sær tíð. Um tú kemur 10 min. ov seint, er bíleggingartíðin farin.

Ætlar tú at taka niður úr interneti, skal tú nýta disklar, sum fáast til keyps í avgreiðsluni. Ikki er loyvt at brúka egnar disklar.

Tú kanst eisini nýta onnur forrit, sum Microsoft Word og Orðaskjáttuna. Avrit kosta eina krónu fyri eintakið.

**Teldupostur**
Mælt verður til, at fólk fáa sær egna teldupost, sum til dømis Hotmail ella Yahoo.

**Vanligar treytir**
Friðarligt skal vera við teldurnar. Ikki er loyvt at broyta uppsetingar.

Um ásettur reglurnar fyri nýtslu av interneti ikki verða fylgdar, kann loyvið at nýta tænastuna verða tiknar


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt jonbrian@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14⁰⁰

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Leingi opið í Handilsmiðdeplinum í Runavík



TÍÐINDASKRIV

Leygardagin 1. februar hava handlarnir í Handilsmiðdeplinum í

Runavíkar Kommunu opið til kl. 17.00.

Í hesum sambandi hava teir nógv góð tilboð. Sum øllum kunnugt er útsølan byrjað, og eru flestu handlarnir á tremur við útsøluvøru.

Eftir innkeypstúrin er møguleiki fyri at fara inn á Hotel Runavík,

Sjómansheimið, at keypa sær okkurt til matna. Tað kalda borðið er at fáa frá kl. 17.00.

Handilsmiðdepilin bjóðar øllum vælkomnum til langan leygardag:

Elding, Hjá Sannu, Tera, Hógv, Ur & Brillustovan, Vøggan, Shop Inn, Orkis, Skósølan, El-Tænastan, Teymavirkið, AWJ-Foto, Sadolin Litaval, Miðberg, Profa Farvur, Heiðabúðin, Jallur, Eysturoyar Heimavirki, Hygg Inn, Bónus, Brotið, Deild C, Føroya Keypsamtøka, Chic, Leikabúðin, Bókabúðin, Fotomiðstøðin, Opus, Telebúðin, Hotel Runavíkar Sjómansheim og Thomas Dam Búnýti.

# Nýggjur ljóðbókalisti




TÍÐINDASKRIV
*Býarbókasavnið*

Ljóðbókalistin er nú komin út av nýggjum. Hetta er ein endurskoðaðað útgáva av listanum, sum kom út í 2001. Bóklingurin, sum er 159 blaðsíður, er eitt yvirlit yvir tær bøkur, sum Býarbókasavnið eigur, lisnar á band. Onkrar bøkur eru farnar úr savninum, og aðrar eru komnar. Til hvørja bók er ein stutt lýsing, har greitt verður frá innihaldinum. Harafturat er gjørt eitt yvirlit, har skaldsøgurnar eru býttar upp eftir evni, t.d. kærleikssøgur, krimisøgur, familju- og ættarsøgur, fremmand lond, kríggj og sjólív. Hetta kann vónandi gera tað lættari at finna eina hóskandi bók.

Tað tykist, at fólki dámar væl at lurta eftir føroyskum tilfari. Vit kunnu fegnast um, at fleiri føroyskar ljóðbøkur eru komnar út tey seinastu árini. Meginparturin er føroyskar skaldsøgur og fevnir bæði um upprunaliga føroyskar bøkur og týddar. Annars er mest talan um siðsøguligt tilfar og endurminningar. Í seinastuni eru nakrar føroyskar ljóðbøkur komnar á fløgu. Tær eru ikki við í listanum í hesi útgávuni, men verða eisini læntar út.

Savnið av donskum ljóðbókum er rættiliga stórt. Nógv ymiskt sløg av skaldsøgum eru, bæði nýggjar og klassiskar. Av øðrum bókum kunnu nevnast ferðafrásagnir og endurminningar.

Øll kunnu læna ókeypis á Býarbókasavninum, og sent verður um alt landið. Fólk, sum ikki sjálv kunnu koma á bókasavnið, kunnu senda onkran fyri seg. Eisini ber til at ringja ella skriva, og vit senda bøkurnar.

Ljóðbókalistin fæst við at venda sær til Býarbókasavnið. Ringi tlf. 313626 ella skrivið til Býarbókasavnið, Boks 358, 110 Tórshavn. Eisini ber til at nýta teldupost: byarbok@byarbok.fo

Á heimasíðuni www.byarbok.fo fæst meira at vita um Býarbókasavnið og hvørji tilboð vit hava.

# Fornfrøðiliga rannsóknin Niðri í Toftum við Borðoyarvík í Klaksvík

TÍÐINDASKRIV
*Norðoya Fornminnissavn*

Fríggjakvøldið 31. januar, verður fyrilestur á Norðoya Fornminnasavni, Klaksvík, har Anna Katrin Matras, fornfrøðingur, leggur fram tey fyribilsúrslit, ið higartil eru greið viðvíkjandi búseting Niðri í Toftum frá seint í víkingartíð og seinni.

Undantikið tað, sum danin Daniel Bruun kannaði seinast í 19. øld og nýliga aðrar smærri fornfrøðiligar kanningar, er rannsóknin Niðri í Toftum tann einasti tíðandi fornfrøðiligi útgrevsturin, sum hevur verðið gjørdur í Norðoyggjum.

Í øllum Norðoyggjum eru fleiri toftir eftir búseting at síggja í lendinum, frásagnir eru um aðrar, sum ikki eru sjónligar í dag, og møguliga liggja upp aftur aðrar toftir í lendi, har vit einki vita um at fólk hava búð.

Tí kunnu vit rokna við, at tá ið vit leita aftur til miðøldina hevur búseturmynstrið verið eitt heilt annað í Norðoyggjum enn vit kenna frá teimum seinastu øldunum, við kendu bygdunum vit enn hava í dag.

Í lendinum runt Borðoyarvíkina eru eisini fleiri sjónligar toftir, har lendið Niðri í Toftum bert er eitt av fleiri.

Hetta økið innast við Borðoyarvík er nú eisini meira fornfrøðiliga komið við upp í tosið um ein komandi veg frá undirsjóvartunnilinum undir Leirvíksfirði, tí her skal vegurin leggjast.

Tí kunnu vit eisini rokna við at meira fornfrøðiligar rannsóknir verða gjørdar har í nærmastu framtíð, áðrenn vegurin verður gjørdur.

Rannsóknin av toftunum Niðri í Toftum byrjaði í 1969, tí hildið varð at toftirnar vóru í vanda fyri at fara í havið, vegna tað at bakkin har var máðaður so nógv, at toftaleivdirnar stóðu fyri at rapa og fara heilt, um ikki varð tikið um tær. Hendan rannsóknin helt fram hvørt summar fram til 1973, tá ið steðgað varð.

Norðoya Fornminnasavn fekk tikið rannsóknina upp aftur í 1989, og varð eisini hildið fram summarið 1990.

Nú seinastu tvey sumrini hevur eisini verið grivið Niðri í Toftum, og hevur Anna Katrin tikið lut í grevstrinum hesi bæði sumrini, seinasta ár sum grevstrarleiðari.

Hon fer í framløguni at leggja fram úrslit frá grevstrinum hesi árini rannsóknin hevur verið, hvørjir bygningar hava verið har, hvørjum tíðarbili teir eru frá, og so fer hon eisini at siga frá nøkrum av teimum mest tíðandi gripunum, ið eru komnir undan kavi í rannsóknini.

Framløgan verður fríggjakvøldið kl. 8.



*Borðoyarvík*